# Arbeiðsleys skulu hava meiri stuðul

**– Tey, sum eru arbeiðsleys skulu nú hava nógv meiri í stuðuli heldur javnaðarflokkurin, sum leggur uppskot fyri tingið um at hækka útgjaldið**

ARBEIÐSLOYSISSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*



*Nú er tíðin komin til at bøta um fíggjarligu korini hjá arbeiðsleysum heldur javnaðarflokkurin, sum hevur lagt uppskot fyri tingið um at hækka útgjaldið úr ALS*

Tey, sum eru arbeiðsleys, eiga at fáa meiriutgoldið úr Arbeiðsloysisskipanini.

Tað heldur javnaðarflokkurin.

Kristian Magnussen løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin, hevur tískil lagt uppskot fyri Løgtingið um at hækkað útgjaldið úr ALS úr 70% av eini arbeiðaraløn, sum tað er nú, upp í 80%. Hækkingin skal koma í gildi á nýggjárinum.

Kristian Magnussen sigur, at tá ið ALS fór at virka í 1992, var tað ein stórur fíggjarligur bati fyri nógvar løntakarar, ið frammanundan bara høvdu forsorgarlógina at dúva uppá, gjørdust tey arbeiðsleys.

– Kreppan var longu tá farin at gera um seg, og fleiri og fleiri gjørdust arbeiðsleys.

– Skjótt gjørdist greitt, at ALS-skipanin ikki megnaði at halda sínar skyldur mótvegis teimum, ið áttu at fáa arbeiðsloysisstuðul, og tí vórðu nógv tiltøk sett í verk fyri at tryggja teimum útgjald. Hann sigur, at ein avleiðing av tí var, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum máttu rinda munandi meir til ALS, enn upprunaliga ætlað, og landskassin læt milliónaupphædd í skipanina, umframt at ALS slapp at læna frá Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum.

Soleiðis bjargaði ALS sær sum frægast ígjøgnum tey fyrstu árini, og skipanin gjørdi sítt til, at vanlukkuliga støðan, ið tá var í samfelagnum, ikki gjørdist uppaftur verri fyri mong, ið vóru arbeiðsleys.

– Seinastu árini er støðan í samfelagnum batnað munandi og arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi.

– Stýrið í ALS hevur boðað frá at gjaldið til ALS skal minka 1. januar og tá skulu arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar rinda 0,5% av lønunum inn í skipanina.

Kristian Magnussen sigur, at frá 1992 til 1996, vóru útgjaldingarnar hjá ALS størri enn inntøkurnar. Men frá 1996 til dagin í dag, hava inntøkurnar verið væl størri enn útreiðslurnar og væntandi hevur ALS lagt einar 470 til 480 milliónir til síðis á nýggjárinum í ár.

### Verða tvífalt revsað

Løgtingsmaðurin sigur, at hóast tíðirnar hava verið góðar seinastu árini, er útgjaldið ikki hækkað yvirhøvur og er enn tað sama, sum tá ið skipanin fór at virka í 1992.

– Tað skuldi ikki verið neyðugt át víst á, hvussu nógv skal til í dag fyri at svara hvørjum sítt, og at fólk, ið missa arbeiði, verða revsað tvífalt: Fyrst verða tey revsað einaferð við tað, at tey missa arbeiði og inntøkuna, men afturat tí fáa tey 70 % av eini vanligari arbeiðaraløn í arbeiðsloysisstuðli.

– Arbeiðsloysisstuðulin er eisini avmarkaður við tað, at útgjaldið í mesta lagi er 70 % av eini vanligari arbeiðaraløn.

Men hóast løntakarar arbeiða yvir, ella hava fingið meiri løn enn sáttmálin sigur, fáa tey onki frá ALS fyri tað og tí er veruligi inntøkumissurin hjá nógvum, ið gerast arbeiðsleys, nógv størri enn tann upphædd, ið arbeiðsloysisstuðulin verður roknaður av.

– Javnaðarflokkurin heldur ikki, at tað er sømiligt, at munur verður gjørdur á fólki, ið eru forðað at vera á arbeiðsmarknaðinum, og at tíðin nú er komin til at bøta um fíggjarligu korini hjá arbeiðsleysum.

– Hámarkið fyri sjúkradagpening er 80% av eini arbeiðaraløn, og tey, ið eru forðað at arbeiða av sjúku ella barnsburði, kunnu fáa 80 % av eini arbeiðaraløn í forsorgarveiting.

– Tí skjóta vit upp, at ALS-útgaldið eisini verður hækkað.

### Kostar 8,6 milliónir

Kristian Magnussne sigur, at verður útgjaldið frá ALS hækkað til í mesta lagi 80 % av eini vanligari arbeiðaraløn, fer útgjaldið úr ALS at hækka 14,3% tilsamans.

Í 2001 vóru 60 mió útgoldnar arbeiðsleysum, og væntandi verður upphæddin áleið tann sama í ár.

– Verður útgjaldið hækkað upp í 80%, økir hetta sostatt um útreiðslurnar hjá ALS uml. 8,6 mió í 2003, verður talið á arbeiðsleysum annars óbroytt.

Harumframt verða útreiðslurnar til forsorgarhjálp øktar í mesta lagi 1,7 mió í 2003.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 metir landsstýrið, at útreiðslurnar til forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi verða 12 milliónir.

# Vilja vita hvat tey gera

**Sambandsflokkurin vil ikki pilka við ALS, fyrrenn hann hevur fingið fulla greiðu á, hvussu tað fer at ávirka skipanina**

ARBEIÐSLOYSISSKIPANIN
*Áki Bertholdsen*



*– Tað er umráðandi, at vit ikki taka nøkur óráð fyri, sigur Lisbeth Petersen*

– Vit ætla ikki at pilka við ALS, fyrrenn vit hava fingið fulla greiði á, hvussu tað fer at ávirka skipanina.

Lisbeth Petersen, løgtingskvinna, sigur, at sambandsflokkurin fer ikki at binda seg til at taka undir við uppskotinum frá hinum andstøðuflokkinum, javnaðarflokkinum, um at hækka stuðulin úr ALS úr 70% av eini vanligari arbeiðaraløn, upp í 80%.

Seinastu tíðina hevur ALS verið nógv frammi í politiska kjakinum og røddir eru frammi um at hækka útgjaldið, lækka inngjaldið og at brúka tað, sum fólk spara við at inngjaldið verður lækkað, til at fíggja eitt longt barnsburðarfarloyvi við.

Lisbeth Petersen heldur, at nú ALS skipanin er so nógv frammi, er tað umráðandi ikki at taka nøkur óráð fyri.

Tí vil sambandsflokkurin ikki taka nøkur sum helst politisk stig viðvíkjandi ALS, fyrrenn flokkurin hevur havt fund við ALS-stýrið fyri at vita, hvussu støðan hjá skipanini er, hvørjar ætlaninar eru og, hvussu ymsar atgerðir fara at ávirka skipanina.

Flokkurin hevur tí biðið stýrið um fund, men enn er ikki avgjørt, nær fundurin verður.

Lisbeth Petersen sigur, at annars er tað grundhugsanin hjá sambandsflokkinum, at ALS er ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava ábyrgdina av og at tað er umráðandi at politikarar geva stýrinum arbeiðsfrið.

– Men nú ALS er so nógv frammi og javnaðarflokkurin hevur lagt uppskot fram um at hækka útgjaldið, sleppa vit ikki undan at taka støðu. Men áðrenn vit gera tað, vilja vit fegin hitta ALS stýrið á máli fyri at vita, hvørja støðu stýrið hevur til øll hesi málini, sigur hon.



# Eingir pengar at spara í Oljumálaráðnum

**-Tað hevði verið eitt ótrúliga skeivt signal at givið feløgunum, sum eru komin higar at leita eftir olju, um vit fóru at skerja játtina til Oljumálaráðið heldur Eyðun Elttør, sum tó viðgongur, at virksemi verður rættiliga avmarkað næstu árini**

FÍGGJARLÓG OG SPARING
*Jan Müller*



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður heldur ikki, at hetta er tíðin til sparingar í Oljumálaráðnum*

Nú fíggjarlógin er til viðgerðar í teimum ymsu løgtingsnevndunum og tosað hevur verið um sparingar er náttúrligt at spyrja tey ymsu landsstýrisráðini, um og hvar tey síggja møguleikar at spara. Eitt av teimum nýggjastu ráðunum er Oljumálaráðið. Enn er eingin lønandi oljukelda funnin og verður lítið virksemi á Føroyaøkinum komandi tvey árini. Sær landsstýrismaðurin í oljumálum, Eyðun Elttør nakran møguleika fyri at spara á játtanini til Oljumálaráðið, sum fyri næsta ár er sett til umleið 30 mill. kr.

Eyðun Elttør viðgongur, at lítið virksemi verður á Føroyaøkinum næsta ár, men kortini heldur hann ikki, at hetta er rætta løtan at spara. -Nettupp í hesum døgum, har vit hava boðið út og tað framvegis eru fleiri nýggjar boringar og vit eisini skulu til at hugsa um eitt nýtt umfar, hevði tað verið eitt sera ringt tekin at latið oljufeløgunum, at man niðurprioriteraði Oljumálaráðið og tess arbeiði.

- Tað eiga vit avgjørt ikki at gera. Eru tað ikki vit, sum hava vónir til at olja og gass kann verða funnið, so stendur illa til. Nú hava vit fingið oljufeløg at vísa okkara øki áhuga og bjóða seg fram og mugu vit bara vóna, at tey framhaldandi fara at vera her.

Fólkini í Oljumálaráðnum hava nokk at gera. Kemur framleiðsla um ikki so langa tíð, tá er so sanniliga brúk fyri at smíða nýggjar lóggávur. Aftrat hesum hevur ráðið eisini umhvørvi og útjaðaran sum part av sínum málsøki. So arbeiði er til allar hendur í Oljumálaráðnum vísir landsstýrismaðurin á.

Eyðun Elttør sigur, at tá fíggjarlógin varð løgd til rættis varð avgjørt at halda seg til somu upphædd sum í fjør og tað, sum er hækkað, stavar frá nýggjum økjum, sum ráðið tekur sær av so sum kolagrevstur, skógarrøkt etc.

Framtaksgrunnurin:

# Allur ivi um politiska stýring beinast burtur

**Framtaksgrunnurin endar einaferð enn í tinginum, tí nú fer Johan Dahl úr sambandsflokkinum um at leggja uppskot fram um at beina burtur allan iva um politiska stýring**

FRAMTAKSGRUNNURIN
*Áki Bertholdsen*

Seinastuni tíðina hevur spurningurin um møguleikan hjá landsstýrismanninum at ávirka avgerðirnar hjá Framtaksgrunninum verið nógv umrøddur.

Hetta er orsøkin til, at Johan Dahl, Løgtingsmaður fyri sambandsflokkin, nú fer at leggja uppskot fyri tingið um Framtaksgrunnin.

Tað er serliga í samband við tá ið nevndin í Framtaksgrunninum skal veljast, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur verið skuldsettur fyri at velja nevndarlimir í grunnin, sum vilja ganga hansara politisku ynskjum á møti og at grunnurin tískil er blivin eitt politiskt amboð í hondinum á landsstýrismanninum.

Hendan ivan við Johan Dahl, løgtingsmaður hava manaðan i jørðina.

### Partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera tilmæli

Tí skjýtur hann upp, at hereftir skulu nevndarlimirnir í Framtaksgrunninum veljast eftir tilmæli frá ymsum feløgum og stovnum.

Hann skjýtur upp, at av teimum fimm limunum í nevndini í Framtaksgrunninum, skulu tríggir nevndarlimir veljast eftir tilmæli frá feløgum og stovnum. Fjórða nevndarlimin skal landsstýrismaðurin velja sjálvur og fimta nevndarlimin velja hinir fýra so í felag.

*Johan Dahl mælir nú til at limirnir í Framtaksgrunninum hereftir skulu veljast eftir tilmæli frá fakfeløgum, arbeiðsgevarafeløgum og Búskaparráðnum fyri at tryggja, at grunnurin er 100% politiskt óheftur*



Johan Dahl mælir til, at ein limur skal verða valdur eftir tilmæli frá sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum.

Í hesum sjeymannabólki eru Føroya Arbeiðarafelag, Starvsmannafelagið, Sjúkrasystrafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Handverkarafeløgini í Føroyum og Fiskimannafelagið, sum eru nøkur av teimum størstu fakfeløgunum

Annars skal ein nevndarlimurin í Framtaksgrunninum veljast eftir tilmæli frá Vinnuhúsinum og ein eftir tilmæli frá Búskaparráðnum.

– Hetta fer at beina burtur allan iva um, at Framtaksgrunnurin er politiskt óheftur, sigur Johan Dahl.

Hann sigur, at í løtuni er tað so, at landsstýrismaðurin í vinnumálum velur fýra av nevndarlimunum í Framtaksgrunninum og at hesir fýra síðani í felag velja fimta limin.

– Framtaksgrunnurin, ið virkar sambært lógini um vinnurekandi grunnar, er ein sjálvseigandi grunnur. Sambært rættarligum grundreglum fyri grunnar er tað ikki loyvt stovnarum at hava ávirkan á ein grunn, sigur løgtingsmaðurin fyri sambandsflokkin

Hann leggur afturat, at eftir uppskotinum er landsstýrismaðurin ikki bundin av tilmælunum.

Men velur hann ikki at fylgja tilmælinum, skal hann sjálvsagt hava eina sakliga og lógliga grundgeving fyri hesum.

– Ein saklig og lóglig grundgeving kann vera, at ein tilmæltur limur ikki lýkur krøvini, ið viðtøkurnar fyri Framtaksgrunnin seta til nevndarlimir. Í slíkum førum hevði tað verið rættast at biðið um nýtt tilmæli, sigur Johan Dahl.

Eftur reglugerðini hjá Framtaksgrunninum, skulu nevndarlimirnir hava kunnleika til vinnulig og búskaparlig viðurskifti. Teir kunnu ikki vera limur í fólkatingi- ella løgtingi og kunnu ikki samstundis vera nevndarlimir ella limir í stjórnunum í teimum fyritøkum, sum grunnurin er ella hevur havt fíggjarligt tilknýti til.

Verður uppskotið hjá Johan Dahl samtykt, kemur tað í gildið næstu ferð nevndarlimir í Framtaksgrunninum skulu veljast 1. apríl næsta ár.